KÍF-H71 31-30 (14-18):

# H71 tveitti stigini burtur

**20 minuttir fyri leiklok vóru hoyvíkingar níggju mál framman fyri KÍF, men onkursvegna megnaðu teir at tveita alt burtur**

MANSHONDBÓLTUR

*Jákup Mørk*

20 svartir minuttir. Somikið einfalt kann seinasta korterið í dystinum móti KÍF helst standa í minninum hjá hoyvíkingum eftir dystin sunnudagin.

Fram til tá høvdu hoyvíkingum, sum til dystin høvdu styrkt seg við Bjarna Wardum, verið greitt oman á í øllum lutum, og úrslitið av hesum stóð eisini eftir á máltalvuni. Eftrir eina hampuliga leiðslu í hálvleikinum, var veruligur sjógvur lagdur ímillum liðini eftir steðgin, og tá tíggju minuttir vóru leiktir av seinna umfarinum stóð 17-26 á máltalvuni.

### Ein gáta

Hvussu kollfirðingar so megnaðu at venda alt hesar seinastu minuttirnar, má enn standa sum ein gáta, tí í roynd og veru átti alt sjálvandi at verið liðugt, og einamest mundu hoyvíkingarnir eisini halda, at so var. Men fyrst og fremst høvdu teir gloymt, at KÍF í Damir Oros hevur ein hin vandamesta álopsleikaran í landinum. Honum ansaðu teir ikki nóg væl hesa løtuna, og sum úrslit av hesum kundi hann átta ferðir høgga bóltarnar í hoyvíkarmálið, og so kundi tað gera tað sama, hvussu málverjin æt.

Fýra minuttir fyri leiklok høvdu kollfirðingar minkað munin niður í eitt mál, men tá H71 so svaraði aftur við sínum seinasta máli, tóktist tað kortini, sum um royndirnar hjá vóru til onga nyttu. Tað eydnaðist tó KÍF at skjóta trý mál afturat í seinastu minuttunum, og so hjálpti tað lítið, at H71 málverjin í berari frustratión langaði nevan í dómaraborðið, tá hesir ikki vóru nóg skjótir at steðga klokkuni.

Við sigrinum slapp KÍF sær eitt fet nærri liðunum í oddinum, meðan hoyvíkingar framvegis eru javnir við Tjaldur á aftasta sessinum. Komandi vikuskifti spæla hovyíkingarnir í Runavík, og tann dysturin fer so at gera av, hvørt av liðunum verður niðast eftir fyrru kappingarhálvu.



*At kalla alla tíðina vóra tað hoyvíkingar, sum flugu hægri, men í seinastu minuttunum fekk KÍF koppað øllum á høvdið*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Dsyturin í tølum

KÍF-H71 31-30 (14-18):
Málskjúttar:
**KÍF:** Damir Oros 13(3), Eddie Joensen 5, Petur Martin Poulsen 3, Vagnur Johannesen 3(1), Rógvi Weihe 2, Hallur Hansen 2, Kristian Madsen 2, Jónálvur Johannesen 1
**H71:** Halgir Dahl Olesen 8, Bjarni Wardum 5(1), Jákup á Borg 5, Niels Viggo Niclasen 3, Tróndur Vatnhamar 3(3), Hans J. Jacobsen 2, Esbern Patursson 2, Bárður Brimvík 1
**Brotskøst:** KÍF 6, H71 5
**Útvísingar:** KÍF 4, H71 4
**Diskvalifikatión:** H71 1 (Beinleðis reytt)
**Dómarar úr Kyndli:** Hannis Wardum & Eyðun Samuelsen.

## Aftur silvur til Heidi

**Hóast hon als ikki hevði sett sær nakað heiðursmerki sum mál undan fráferðini, so hevur Heidi Andreasen higartil vunnið tvey silvurmerki í HM-kappingini í svimjing fyri brekað**

SVIMJING

*Jákup Mørk*

Ætlanin var sum so bara at gera tað so gott sum gjørligt. Heidi Andreasen hevði als ikki tær stóru vónirnar um heiðursmerki við í viðførinum, tá hon fyri tveimum vikum síðani setti kósina móti Suðuramerika, har hon fyrst var á venjingarlegu í Brasilia, áðrenn farið varð undir HM-kappinga í Argentina.

Ein skurðviðgerð í økslini gjørdi sítt til, at vónirnar vórðu dempaðar so hampuliga nógv, og tí ráddi fyrst og fremst um at finna út av, hvar støðið nú skuldi leggjast við atliti til OL komandi summar.

Og skal metast eftir HM-kappingini, so skal miðjast høgt til komandi Olympisku leikirnar. Sunnudagin ognaði Heidi sær í øllum førum næsta silvurmerki í síni triðju kapping. Hesa ferð var talan um kappingina í 400 frí, har Heidi kom á mál eitt gott sekund eftir ísraelska vinnaran av kappingini.

Undan hesum hevði Heidi vunnið silvur á 200 metra teininum í frísvimjing, umframt at gerast nummar seks í 200 metra blandaðari svimjing.

## Eyðvør Thomsen skal venja AB

Hóskvøldið í farnu viku skrivaðu Eyvør Thomsen og AB undir sáttmála, sum komandi árið ger nú fyrrverandi HB-leikaran til venjara hjá AB.

Eyvør Thomsen er 21 ára gomul, men hóast sín unga aldur, so hevur hon drúgvar royndir sum leikari á besta HB-liðnum, tó at hesar royndir hava verið skerdar nakað seinasta árið orsakað av støðugum trupulleikum við skaðum.

Tað hevur annars verið Johan M. Stenberg, sum hevur vant AB-kvinnurnar í ár, men eftir eitt gott ár, sum enntá endaði við uppflyting metir hann seg ikki hava neyðugu orkuna til venjarastarvið.

*-jm*

# Ein varði yvir fótbóltsárið

**Fasta jólagávan til fótbóltsøra føroyingin er nú aftur komin í sølubúðirnar**

ÁRBÓK

*Jákup Mørk*

Talan er sjálvandi um árbókina, fótbóltur '02 sum forlagið ítróttarbøkur hevur latið úr hendi.

Hetta er 11. árið á rað, at fótbóltsárbókin verður givin út, og bara tað í sjálvum sær borgar fyri góðskuni í henni, tí her heima eru traditiónirnar við slíkum útgávum ikki tær heilt stóru.

Og sær sjálvum so lík, so er bókin aftur hesa ferð vaksin í vavi. 184 síður er bókin til støddar hesaferð, og nógv tann størsti parturin av hesum er sum vant sett av til kappingina í fyrstu deild hjá monnum.

Men tað merkir so ikki, at rúmd ikki fyri øðrum enn bestu mansdeildini. Umførða er sjálvandi eisini av kappingini hjá kvinnunum og teirri í aðru deild, umframt at landslið - frá A-landsliðnum og niðureftir – eisini fáa sín part. Knappliga 200 myndir eru eisini í bókini umframt at hagtølini eisini hava sín sjálvsagda part.

Tað eru teir tríggir, Finnur Helmsdal, Jóannes Hansen og Ivan Eginsson, sum hava skrivað og lagt tilfarið til rættis. Hestprent hevur síðan staðið fyri uppseting, prenttilgerð og prenting.






"Enigma" koyristólur

Stólurin kann klappast saman og hjálpimotorur kann eisini setast á



Einans kr. 5.500 + mvg

Ergo & Hjálpartól
Íslandsvegur 39 · Tlf. 315 777 · 215 778
Fax 322 998
t-postur: ergo@post.olivant.fo
- vit senda um alt landið

Her er hon...
Jólagávan
16.500,-
Compaq
Presario 6249EA
2.4GHz, Pentium 4
512 MB DDR RAM
120 GB harðdisk
DVD + CD-RW
56K modem
GeForce MX420 grafik við 64MB
USB 2.0
v/ 17" Compaq S7500 skermi
Eyka fyri 19" skerm kr. 1.000,-
Eyka fyri 15" TFT skerm kr.2.500,-
Vinn
Jólakapping
Hvat merki av teldum umboðar Com-Data?
Navn:
Bústaður:
Bygd/Býur:
Seðlarnir skulu verða COM-DATA í hendi í seinasta lagið tann 2. januar 2003. Trekt verður 3. januar 2003 millum innkomnar seðlar.
Vinningurin er ein Apex ferðaseðil á einum av rutunum hjá Atlantic Airways.
www.com-data.fo
COM-DATA
Klaksvík tlf. 476100 Saltangará tlf. 449840
COMPAQ Local Service Partner




18. des.
kl. 16-19 Barnaansing í Margarinfabrikkini. Jólahugni, jólaklipp og søgur
kl. 16.45 GHM spælir í Vágsbotni
kl. 17.00 Jólamaðurin kemur til Havnar. Thorshavn kemur í Vágsbotn við jólamonnunum.
kl. 17.30 Livandi Krubbuspæl og songur úr Evangeliihúsinum í Grasagarði
kl. 18.00 GHM spælir í gongugøtuni

19. des.
kl. 16-19 Barnaansing í Margarinfabrikkini. Jólahugni, jólaklipp og søgur
kl. 17.00 Havnar Ungdómshornorkestur spælir í Dr. Jakobsens gøtu
kl. 18.00 Lossingarmenn spæla í gongugøtuni

20. des.
kl. 16-18 Barnaansing í Margarinfabrikkini. Jólahugni, jólaklipp og søgur
kl. 18.00 Kamarkórið syngur í gongugøtuni
kl. 19.00 GHM spælir í gongugøtuni
kl. 19.00 Frelsunarherurin spælir í Dr. Jakobsens gøtu

21. des.
kl. 11.00 Frelsunarherurin spælir í gongugøtuni
kl. 15.00 Jólamenninir koma ríðandi á Kongabrúnni og víðari gjøgnum býin
kl. 15.00 Kamarkórið syngur á Kongabrúnni og aftaná ymsastaðni í býnum.
kl. 17.00 Havnar Ungdómshornorkestur spælir í gongugøtuni

22. des.
kl. 16-30 Børn og ung úr Ebenezer syngja í gongugøtuni
kl. 17.00 Cantabile syngur ymsastaðni í býnum
kl. 18.00 Havnar Hornorkestur spælir í Gongugøtuni

23.des.
kl. 17.00 Cantabile syngur í gongugøtuni
kl. 18.00 Lossingarmenn spæla í gongugøtuni
kl. 19.00 Havnar Hornorkestur spælir í Dr. Jakobsens gøtu
kl. 19.00 Frelsunarherurin spælir í gongugøtuni.

Jólamenninir verða í býnum hvønn seinnapart frá 18.-23. desember
Handlarnir hava opið til kl. 20, og lítlajólaaftan til kl. 22.